 Lívið á Landssjúkrahúsinum

at opna bringurúmið og búkrúmið, sigur hann við Ova Berg Jacobsen, ið stendur klárur við knívinum.

Ove sker í einum heilt úr barkakulluni niður til kynsgøgnini. Feittlagið á búkskurðinum er sum á seyði, men kanska eitt sindur gulari. Hann sker inn á bein í bringuni, men ansar væl eftir, ikki at skera hol á tarmarnar við tí svartskeftaða einnýtisknívinum. So nógv luft er í tarmunum, at teir liggja alspentir upp undir búkveggin. Síðan loysir Ove húðina frá bringuni. Teir tríggir portørarnir, Allan Samulsen, Kristian Gaardbo og Olav Andreasen, eygleiða tilgongdina.

– Er man for harðligur, kann man stinga hol á magasekkin. Huff! Tað blívur eitt svans! Tá er ikki til at arbeiða, sigur Ove við teir og sker víðari.

Ove minnir mest um ein óvanliga reinligan flettara. Men hann brúkar tong at klippa rivjabein við, so hann fær bringubeinið burtur og sleppur at gøgnunum har. Kaminski fylgir væl við og greiðir frá:

– Sambært illgrunanum mugu vit fram um alt kanna hjartað. Um eina løtu skal eg vísa tykkum, at vit kunnu síggja, hvørjum sjúklingurin doyði av. Men vit skera eisini flísar av gøgnunum og kanna deyðsorsøkina mikroskopiskt, leggur hann dent á.

Lunguni og hjartað verða loyst í einum, og Kaminski klippir hjartamørin upp.

– Hetta hjartað er ikki normalt, staðfestir hann straks og sipar til støddina. Tað er alt ov stórt; serliga vinstra helvt. Hann heldur blóðugu hondina upp ímóti áskoðarunum, knýtir hana og greiðir frá:

– Alt hjartað eigur at vera sum ein nevi til støddar, men vinstra helvt av hesum hjartanum er sum hálvur annar nevi, sum tit síggja. Hetta bendir greitt á, at vinstra innrúm í hjartanum er ovurment orsakað av ov høgum blóðtrýsti.

## Æðrakálking í eygsjón

Vit fara nú longri niður og síggja blindgørnini, og hvussu nógv luft er í langanum. Tarmarnar verða loystir heilt niður í rektum. Alt skal úr; eisini sáðstreingir og steinar, hóast sannlíkt er, at deyðsorsøkin er hjartað.

– Er líkuppskurðurin rættarligur, hanga steinarnir í øðrum endanum og tungan í hinum, og so verður alt tikið innanúr í einum, viðmerkir Ove, sum annars er


Modellmynd: Jens Kristian Vang

tigandi og róligur. Øðrvísið er við Allani, sum er ógvuliga hugtikin:

– Alt er so fantastiskt samanbundið. Man trýr tað er lygn, altso, sigur hann og hyggur við sínum stóru, livandi eygum eftir gøgnunum hjá tí deyða.

Nógv blóð er nú runnið út í kroppin. Ove tekur eitt blankt liturmál og eina súpanaroysu og oysir burtur tað blóðið, ið liggur í hyljum í ryggjarkullunum.

Vit finna so aorta; meginlívæðrina. Hon liggur rættiliga væl vard og huld í rygginum, tá ið tú hugsar um, at hon er sum eitt tummarør til støddar.

– Vissi hon rýkur, so doyrt tú her og nú, brestur burtur úr Allani.

Ove sker aorta av í erva og loysir hana allan vegin niðureftir. Olav veit at siga, at vena cava er meginbláðæðrin, sum er leiðingin, ið aviltað blóð fer ígjøgnum á veg aftur í høgra upprúm í hjartanum, haðan tað verður pumpað í innrúmið og víðari gjøgnum eina lívæðr til lunguni at ilta aftur.

Lukturin úr einum opaðum líki er ógvuliga torførur at lýsa, burtursæð frá, at hann var nógv tann størsta avbjóðingin fyri blaðmannin. Lukturin er onkursvegna gjøgnumgatandi søtligur við eitt farra av tí, ein kennir frá fletting.

– Hetta er einki, sigur Ove, sum minnist, at teir eina ferð næstan noyddust at steingja røntguna orsakað av deyðsdeymi, sum fór gjøgnum luftskipanina. Tá luktaði um alt húsið.

– Hetta er tað, ið ger, at ein er á lívi, hugleiðir Allan, tá ið allur innvølurin er komin yvir á kanningarborðið.

Kaminski klippir hvíta aortabogan upp. Æðrin tykist sera rein. Men fyri tað roynda patologeyga er hetta als ikki normalt. Har eru blettir innan; kálkblettir, sum patologurin kallar teir. Hetta samsvarar við myndina av einum manni, ið hevði høgt blóðtrýst, sum oftast er elvt av æðrakálking.

## Samansett deyðsorsøk

Líkið sær løgið út fyri tað óvandað eygað. Tað er tómt innan. Eitt mannahøvd á rovum. Men Ove hevur nú vaskað alt, og lík, skurðborð og annað er reint og nossligt.

– Skuldi onkur ungur læknalesandi viljað komið og hugt, skal alt ikki flóta í blóði, sigur Ove.

Samstundis stendur Kaminski boygdur yvir rustfría kanningarborðið. Fimm saksar, tvær pinsettir og ein stórur flísaknívur eru høvuðsamboð hansara. Spakuliga greinar hann seg inn á deyðsorsøkina. Men fyrst mátar hann hjartað at vita, hvussu lutfallið er millum likam og likamsgagn. Jú, maðurin hevði eitt stórt hjarta.

– Vinstri partur av hjartanum er nógv størri enn hin. Hann er vaksin orsakað av ov høgum blóðtrýsti, sum hevur víðkað væddastøddina í vinstru hjartahálvu, staðfestir patologurin.

So sker hann hjartað sundur og hyggur væl eftir innrúmunum, æðrargreiningunum og hjartalokunum. Eisini klippir hann meginbláæðrina og aðrar æðrar upp. Væddagreiningarnar inni í hjartanum eru hugtakandi á at líta; sum fleiri lokkanet hvørt oman á annað. Í onkrum æðrum síggja vit aftur kálkblettar. Men vit síggja ongan blóðtøpp við berum eygum.

Saksastøddin minkar, so hvørt sum uppkliptu æðrarnar klænka. Kaminski skolar so hvørt og hyggur væl eftir æðrakálking. Nú sker hann størru hjartahelvtina sundur. Í æðrunum og væddaøkinum eru í serlæknaeygunum á pólendska patologinum tekin um tað, hann rópar »fresh infarkt«. Tað er, at vevnaður nýliga er oyðilagdur av blóðtøppi. Deyðsorsøkin kann so statt vera ein samanseting av, at hjartað er ov nógv vaksið orsakað av æðrakálking í kroppinum, og at eisini æðrarnar í sjálvum hjartanum eru kálkaðar.

Hjartalæknin, Heðin Thomsen, kemur innar og fær at vita frá Kaminski, at sjúklingurn er deyður av hjartasteðgi, sum samsvarar við klinisku myndina.

– Thank you, sigur Heðin og skundar sær út aftur.

## Virðismiklar upplýsingar

Nú hyggja vit at gøgnunum úr búkøkinum. Har eru livurin, magin, nýruni, brisið, bløðran, magin, gallið og miltið. Alt verður klipt upp og kannað. Á yvirflatanum á summum av gøgnunum eru patologisk tekin um, at tey hava verið undir stórum trýsti orsakað av hjartatilburðinum, sum eyðsýniliga tók lívið av manninum.

– Vit mugu hava í huga eitt: Hetta er allarseinastu ferð, sjúklingurin verður kannaður. Tí mugu vit vera so serliga nágreinilig, sigur Kaminski og sker vevnaðarroyndir av øllum gøgnum, so at hann kann fáa váttað fyribils sjúkuavgerðina við kanningum undir sjóneyku.

Kaminski sker smáar bitar av gøgnunum; einar 8 millimetrar tjúkkar og nakrar sentimetrar hvønn vegin. Ove fer eftir einum av teimum væl kendu, hvítu sildabyttunum, sum rúma okkurt um einum litri. Hann koyrir vevnaðarroyndirnar í byttuna og tekur avgreiddu gøgnini og leggur tey upp á ein gráan bakka.

At enda verða gøgnini vigað, áðrenn Ove leggur tey í sama stað, sum tey lógu í líkinum. Tá ið hann hevur seymað stóra skurðin saman og klistrað eitt hvítt plástur omaná, verður maðurin latin aftur í klæðini og sendur víðari til seinastu ferðina.

Ove heldur arbeiðið vera sera spennandi og avbjóðandi men eisini eitt sindur løgið. Fyrstu ferð, Ove steig innar í líkrúmið, kom hann lúrandi. Men so líðandi vandi hann seg við at fáast við tey deyðu. Nú hugsar hann als ikki um annað enn at gera arbeiði so gott og virðiligt sum gjørligt.

– Tilvenjing skal til. Tað virkar bara so løgið, vissi man hugsar, at hatta er eitt menniskja. Tað skal sodnast í høvdinum, viðgongur hann.

Kaminski fer inn á skrivstovuna á Rannsóknarstovuni at skriva frágreiðing um alt, ið uttanhýsis og innanhýsis kanningin av likaminum hevur víst. Hann heldur, at tað var lætt at finna hesa deyðsorsøkina.

– Einki problem! Myndin av hjartanum var ógvuliga eyðkend, so eg vænti, at sjóneykumyndirnar fara at vátta greiða illgrunan.

Sambært Ova er orsøkin til líkuppskurð fyrst og fremst, at sleppast skal undan, at tað seinni verður sáddur ivi um okkurt.

– Einaferð leggja sorgin og vónloysið seg, og fólk finna fótafestið aftan á, at tey hava mist. Tá er gott at hava møguleikan at fáa svarað, hvørjum pápin ella beiggin doyði av, heldur hann.

Sosialurin